# Katrina arbeiðir á amerikonsku sendistovuni

KATRINA FLUTTI FYRSTU FERÐ TIL BERLIN Í SAMBANDI VIÐ SÍN LESNAÐ, OG HENNI DÁMDI SO MIKIÐ VÆL, AT HON SEINNI SUM LIÐUGT ÚTBÚGVIN VALDI AT LEITA SÆR STARV Í BÝNUM



Pætur Hjalmar Evensson

– MAN SKAL NÆSTAN KÝTA seg fyri at keða seg her.

Tað sigur 32 ára gamla Katrina Thomsen úr Havn, sum vit hitta til eitt prát mitt í býnum hendan fríggjadag seinnapart.

Katrina hevur búð í Berlin í nøkur ár eftir hondini, og hon stórtrívist her í býnum.

– Fyrst og fremst dámar mær væl allar teir møguleikarnar, sum eru her. Her hendir altíð okkurt. Uttan mun til um tú ert typan, sum gongur nógv í býnum, vitjar museum, ger ítrótt ella hvat tað nú skal vera. Her er altíð okkurt til øll, fortelur hon.

Vit sita í einari kafé á kendu gøtuni Unter Den Linden beint við Brandenburger Tor. Hóast tað er november, er veðrið hóskandi til at sita uttanfyri. Heiti kaffimunnurin ger tað ikki verri.

Mitt millum trøini á breiðu gøtuni reikar ein allerhelst ávirkaður maður og rópar. Hann rópar og rópar okkurt, sum hvørki vit ella hini fólkini, ið ganga framvið, skilja.

– Hatta er tað vanliga. Eftirsum tað er ein milliónbýur, so er tað generelt eisini meira ófriður, bæði so og so, fortelur Katrina.

At Katrina valdi at flyta til Berlin, hevur sín uppruna í hennara útbúgving. Hon byrjaði at lesa International virksomhedskommunikation í 2014 við sergrein í týskum. Fjórða semestrið var avsett til at taka uttanlands, og fyri Katrinu var tað tí upplagt at fara til Týsklands.

– Tað var meiningin, at eg skuldi vera her í eitt hálvt ár. Men mær dámdi so væl á universitetinum, at eg valdi at taka eitt semestur aftrat her, fortelur Katrina, sum seinni eisini endaði við at taka eina kandidatútbúgving í altjóða fyrisiting í Berlin.

Í 2021 flutti hon heim til Føroya at arbeiða og søkti ymisk størv við síðuna av. Tá hon so fekk starv hjá einari tøknifyritøku í Berlin, var einki annað at gera enn at leypa avstað aftur til stórbýin. Hon arbeiddi tá við at innsamla data frá børsnoteraðum fyritøkum í Norðurlondum og var har í eitt ár.



– Hatta var ikki akkurát tað, eg vildi gera í longdini, fann eg útav. Eg vildi hava meira at gera við mentan og fyrisiting. Tí royndi eg at halda eyga við leysum størvum í sendistovunum her. Eg prøvaði so at søkja eitt starv á amerikonsku sendistovuni, tó uttan at vænta at fáa tað, tí typiskt fáa tey við amerikanskum statsborgaraskapi fyrimun í mun til aðrar umsøkjarar, greiðir Katrina Thomsen frá.

– Eg ætlaði at finna okkurt heima í Føroyum, um eg ikki fekk hetta starvið. Men so fekk eg tað. Og tað kom nokkso óvart á. Nú havi eg verið har síðan september, og eg trívist



Katrina framman fyri Brandenburger Tor

ordiliga væl. Hetta er eitt spennandi arbeiðspláss, og eg avi góðar starvsfelagar.

## Starvið er í fyrisitingini innan innkeyp.

Tosar flótandi týkst

Týska málið er eingin trupulleiki fyri Katrinu. Hon lærdi tað av fyrstan tíð í sambandi við útbúgvingina og brúkar málið nógv, bæði til arbeiðis og heima í kollektivinum, har hon býr.

– Tað er so nógv, sum verður so nógv lættari, um man dugir málið. Eg merki ein týðligan mun á nú og fyrstu tíðini her, tá eg ikki tosaði so væl týskt. Man fær generelt eisini meira respekt frá týskarunum, um man tosar týskt og roynir at blíva integreraður, sigur hon.

– Her eru jú nógv, sum slett ikki duga enskt. Serliga tað eldra ættarliðið, sum eru frá fyrrverandi DDR (Eysturtýsklandi). Har var jú eingin frálæra í enskum tá.

## Poledance í frítíðini

Sum Katrina sigur, so er ringt at keða seg í Berlin, og hon hevur eisini nokk at gera í frítíðini. Hon ger serliga nógv burturúr at dansa poledance – ein listarligur dansur, sum man brúka eina stong at lyfta seg sjálvan upp við.

– Eg byrjaði í Føroyum, tá man kundi ganga til tað í Burn. Tá eg flutti til Berlin aftur, byrjaði eg at venja meira seriøst her. Eg eri glað fyri, at umstøðurnar til tað eru so góðar her. Tað er blivið populert seinastu árini.

*Tað krevur nógva styrki, ha?*

– Tað krevur ræðuliga nógv, ja. Bæði styrki og smidleika. Teir fyrstu mánaðirnir eru serliga harðir. Men við tíðini, tá man kemur meira inn í tað, verður tað lættari.

Katrina flennir og kemur við einari ásannan:

– Beint nú livi eg eitt nokkso atypiskt berlinaralív. Mín lívsstílur er kanska ikki so berlinarasligur í mun til tann hjá øðrum, tí eg gangi hvørki í býnum ella drekki, men brúki meira mína tíð uppá at venja og arbeiða. Summi liva jú fyri hesum techo-lívsstílinum, har man gongur í býnum frá hóskvøldið til mánamorgun… Nei nei, tað er ikki akkurát eg, sigur hon.

## Berlin sum býur

Men Berlin sum býur er so øgiliga nógv annað enn akkurát tað. Katrina er serliga hugtikin av tí søguliga og mentanarliga í býnum.

– Mær dámar væl, at Berlin enn er so dámt av søguni. Man sær tað so væl, tá man gongur runt í eystur og vestur. Man kann finna nøkur spor av søguni allastaðni.

– Mær dámar eisini væl, at tað ikki er so yvirmoderniserað allastaðni, sigur hon.

– Eitt annað gott er, at Berlin liggur so sentralt í Europa. Tað er lætt at koma onkra aðrastaðni, um man fær hug til at fara ein vikuskiftistúr.

*Er har nakað, tær dámar minni væl við býnum?*

– Ja. Man sær nógv meira til fólk, sum eru í neyð, í mun til í Føroyum og Danmark. Man møtir næstan hvønn dag heimleysum í nærum øllum økjum í býnum. Eg kann gott liva við tí, men tað er eitt sindur øðrvísi at síggja so nær, og tað ger inntrykk, sigur Katrina.

Saknurin til Føroya er eisini til staðar onkuntíð.

– Eg sakni havið og fjøllini í Føroyum, havi eg funnið útav, síðan eg flutti higar. Og faktiskt sakni eg eisini føroyska veðrið. Sumrini her í Berlin eru for heit til mín smag, serliga tá tað fer upp um 30 gradir. Her er eingin atgongd til hav, og tí verður tað kanska nokkso fuktigt og inniklemma. Mær dámar generelt væl vetur og heyst, sigur hon.



Í frítíðini ger Katrina pole-dance